UTTAN ÚR HEIMI



*Góða úrslitið hjá Sosialdemokratunum kemur Helle Thorning Schmidt, floksformanni,. væl við*

*Mynd: Reuters*

# Gott fyri Thorning-Schmidt

**Sosialdemokratiski formaðurin var væl nøgd við valúrslitið, og tað eigur hon eisini at vera, halda politiskir eygleiðarar**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sosialdemokratiski floksformaðurin, Helle Thorning Schmidt, var ovurfegin um úrslitið av kommunuvalinum. Ei undur í, tí tað er synd at siga, at hon hevur havt eydnuna við sær, síðani hon tók við. Misjavnar fráboðanir frá flokslimum í týðandi málum hava gjørt, at fólk hava ivast í hennara leiðaraevnum, og hesum hevur stjórnin eisini gjørt sær dælt av.

Tí var tað heppið fyri hana, at Sosialdemokratarnir vunnu kommunuvvalið. Kortini halda politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn, at úrslitið hjá flokkinum gevur ikki ta røttu myndina av støðuni, tí landspolitiskt er flokkurin ikki so sterkur, sum úrslitið fyrradagin vísir, siga teir.

- Úrslitið er í veruleikanum sera gott samanborið við ta landspolitisku støðuna, sigur valgranskarin Roger Buch Jensen við Berlingske Tidende. Hann heldur, at tað góða úrslitið kemst millum annað av, at fleiri av teimum leiðandi politikarunum vóru sjónligir í valstríðnum, og tí heldur hann tað vera spennandi at vita, um Vinstri fer at gera tað sama á næsta kommunuvali.

Ein av teimum fremstu politisku viðmerkjarunum, Ralf Pittelkow, sigur við Politiken, at Sosialdemokratarnir sluppu frá valinum við skinninum á nøsini, sum hann tekur til. Hann heldur ikki, at valið var ein stórsigur fyri flokkin, men at at floksleiðslan tó kann fegnast um, at tann landspolitiska afturgongdin sæst ikki aftur í lokalpolitikkinum.

## Úrslitið í tølum

Sosialdemokratarnir gjørdust sum nevnt aðrastaði tann stóri vinnarin á danska kommunuvalinum. Í prosentum sær atkvøðubýtið soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Sosialdemokratarnir | 34,3 |
| Tey Radikalu | 5,2 |
| Konservativi Fólkaflokkurin | 10,3 |
| Sosialistiski Fólkaflokkurin | 7,4 |
| Danski Fólkaflokkurin | 5,9 |
| Vinstri | 27,5 |
| Eindarlistin | 2,7 |
| Slesvigflokkurin | 0,1 |
| Aðrir flokkar og listar | 6,6 |

Valluttøkan var 69,4 prosent.

## Fortíðin revsaði hana

Danski Fólkaflokkurin fekk eitt vánaligt úrslit í Keypmannahavn. Flokkurin fekk 5,9 prosent av atkvøðunum ímóti 7,7 prosentum á valinum í 2001.

Tað er lítil ivi um, at tað var fortíðin hjá velavninum Louise Frevert, sum kostaði flokkinum dýrt. Sum ung spældi hon í nøkrum pornofilmum, og í seinastuni hava nógvir danir sæð filmsmyndirnar aftur. Fyrst komu tær í bløðini, hóast nakað fjaldar, seinni vóru tær á alnótini, og teir seinastu dagarnar undan valinum hingu stórar myndir av henni á lyktasteyrunum í Keypmannahavn. Lógin bannar okkum at prenta tær, men sigast kann, at tær vóru ikki serliga hóskandi fyri eitt politiskt valevni.

Valið royndist annars ikki serliga væl hjá Danska Fólkaflokkinum, men Pia Kjærsgaard, formaður, uggaði seg við, at heldur ikki hjá hennara flokki sigur úrslitið sannleikan um landspolitisku støðu floksins.

## Brixtofte kom aftur

Harafturímóti tykist tað ikki, sum at fortíðin órógvar fyrrverandi borgarstjóran í Farum, Peter Brixtofte. Á valinum fyrradagin stillaði hann upp á sínum nýggja flokki, Vælferðarflokkinum, og tað eydnaðist hon at sleppa í býráðið í Furesø kommunu, sum Farum nú er partur av.

Tað var tó langt ímillum atkvøðutalið hesaferð og tað, sum Brixtofte var vanur við. Á valinum í 2001 fekk hann meiri enn 50 prosent av atkvøðunum í Farum kommunu. Hesaferð fekk hann 4,8 prosent. Tó so, í gomlu Farum kommunu fekk hann 10 prosent.

# Rimmar val



*Jan Trøjborg*
*Mynd: Reuters*

Undan valinum var rættiliga stórur spenningur um, hvussu kommunusamanleggingin fór at ávirka úrslitið í summum kommunum. Ein av hesum var Horsens, sum eftir samanleggingina eisini umfatar tær báðar minnu kommunurnar Gedved og Brædstrup. Valið her var serliga spennandi, tí vanliga standa Sosialdemokratarnir sterkir í Horsens, meðan Vinstri hevur verið sterkur í hinum báðum kommununum.

Men úrslitið var, at Sosialdemokratarnir vunnu ein so ruddiligan sigur, at teir mynda meiriluta uttan hjálp frá øðrum flokkum. Tað var ikki minst høvuðsvalevninum, fyrrverandi verjuráðharranum Jan Trøjborg, fyri at takka. Sosialdemokratarnir fingu ikki minni enn 48,3 prosent av atkvøðunum og 16 av teimum 31 býráðslimunum. Vinstri fekk 11 umboð í býráðið.

# Nøgd hóast afturgongd

**Vinstri ætlaði sær at vinna, men tapti. Kortini er floksleiðslan ikki vónbrotin**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Á einum fundi fyri tveimum mánaðum síðani segði næstformaðurin í Vinstra, Lars Løkke Rasmussen, at flokkurin skuldi vinna kommunuvalið í heyst og tryggja sær fleiri borgarstjórar enn Sosialdemokratarnir.

Tey orðini gingu ikki út. Enn hava ikki øll kommunustýrini ikki skipað seg, men í gjár hevði Vinstri tryggjað sær 33 borgarstjórar, meðan Sosialde mokratarniur høvdu fingið 43. Seks kommunur høvdu ikki borgarstjóra enn.

Kortini sigur Lars Løkke Rasmussen seg ikki vera vónbrotnan av valinum. Hann vísir á, at í nógv teimum flestu kommununum hava teir reyðu flokkarnir ikki meiriluta, og at tað í sjálvum sær ger, at tey í Vinstra kunnu vera nøgd. Harafturat fegnast hann um, at tað eydnaðist at fáa sosialdemokratarnar frá leiðsluni í Odense, sum við hjálp frá Vinstra fær konservativan borgarstjóra.

Lars Løkke Rasmussen er samdur við teimum viðmerkjarunum, sum siga, at úrslitið á kommunuvalinum lýsir ikki tað landspolitiska býtið ímillum teir báðar stóru flokkarnar.